Bygdaráðsformaðurin í Mikladali:

# – Kommunan er oyðiløgd

**– Foreldrini á Trøllanesi hava saman við Mentamálastýrinum oyðilagt okkum kommununa, heldur Markus í Norðnástovu, sum umhugsar at rýma úr Mikladali**

TRØLLANES-TRÆTAN
*Eyðun Klakstein*

**Kalsoy:** Gerandisdagurin í Mikladali og á Trøllanesi er nú so nógv merktur av trætuni um skúlan á Trøllanesi, at sjálvt bygdaráðsformaðurin í kommununi umhugsar at rýma.

– Eg eri føddur og uppvaksin í Mikladali, men eg ongantíð áður uppliva slíkt klandur, sum tað nú er vorðið til. Vit eru eitt sindur í villareiði, og eg ivist í, um rætta loysnin kanska bara er at flyta av bygdini, sigur Markus í Norðnástovu.

– Kommunan er oyðiløgd, og tað eru foreldrini á Trøllanesi, sum saman við Mentamálastýrinum hava syrgt fyri tí. Mentamálastýrið hevur við sínum skeivu framferð skapt nógv rumbul í hesum máli, heldur hann.

### Hava roynt at loysa málið

Trætan um skúlan á Trøllanesi hevur langa og fløkta forsøgu, og tey átta skúlabørnini á Trøllanesi hava ikki verið í skúla síðani fyri summarferiuna í fjør.

Foreldrini á Trøllanesi krevja, at skúlin í bygdini verður tikin í nýtslu aftur, soleiðis sum gamla bygdaráðið gjørdi av fyri einum góðum ári síðani. Hendan avgerð varð broytt, tá nýggja bygdaráðið kom til í januar í fjør.

– Vit royndu at finna onkra loysn, soleiðis at skúlin á Trøllanesi kundi brúkast sum ein verkstaður ella okkurt líknandi. Hugsanin var so, at børnini kundu verða har ein dag um vikuna, sigur Markus í Nornástovu.

– Men foreldrini hava nú bara eitt ultimativt krav um, at skúlin á Trøllanesi skal brúkast helvtina av tíðini, tey vilja ikki hoyra talan um annað.


*Trætan um skúlan á Trøllanesi er løst púra fast, og lívið í norðaru kommununi á Kalsoynni er merkt av stríðnum*

### Best við einum skúla

Bygdaráðsformaðurin í Mikladals kommunu staðfestir enn einaferð, at avgerðin um skúlan á Trøllanesi verður ikki broytt.

– Vit halda, at tað er best við einum skúla í kommununi, tí tað fáa børnini meira burturúr. Vit vóru tó opin fyri, at skúlin á Trøllanesi kundi brúkast til okkurt, til dømis í krevtivum arbeiði, men tey á Trøllanesi vilja bara góðtaka, at skúlatíðin verður býtt javnt millum skúlarnar á Trøllanesi og Mikladali, og tað kemur ikki upp á tal, sigur Markus í Norðnástovu.

– Gamla bygdaráðið sat fýra ár við meiriluta á Trøllanesi, men tey gjørdu einki fyri at lata skúlan á Trøllanesi uppaftur. Tey kláraðu sjálvi at fella eitt uppskot um tað. Beint áðrenn tey løgdu frá sær, samtyktu tey, at nú skuldi skúlin lata uppaftur, og so skuldi nýggja bygdaráðið taka sær av tí.

Nýggja bygdaráðið tók skjóta avgerð um at strika avgerðina hjá gamla bygdaráðnum, tí tey hildu ikki, at tað var ráðiligt við tveimum skúlum í kommununi.

Hetta hevði við sær, at foreldrini á Trøllanesi tóku børnini hjá sær úr skúlanum, og síðani hava tey fingið undirvísing heima.

Klæði til skjúrt
130 cm breitt 1078,- pr. mtr.
Vit seyma skjúrt eftir máti
Klæði til barnaskjúrt
150 cm breitt 190,- pr. mtr.
Vestastykkir í fleiri litum
Buksuvadmal
Klæði til turriklæð og fyriklæði - brist - elastikk belti
Skálabúðin
Dr. Jakobsensgøta 21 - Tel 315315

BRIAN YOUNG
spælir á Caféini
16.-20. januar



Hann framførir tónleik hjá
*The Beatles, Creedence Clearwater Revival, Bob Dylan, Oasis, Van Morrison, Crowded House osv.*
*livandi tónleikur*
Café Natúr
Tlf. 31 26 25

# Prestur roynt at mekla

**Hans Eiler Hammer hevur gjørt eina roynd at fáa fund í lag millum fólk á Trøllanesi og foreldrini at børnum, sum búgva í Mikladali**

TRØLLANES-TRÆTAN
*Eyðun Klakstein*

**Kalsoy:** Fleiri fólk hava seinastu mánaðirnar óformliga roynt at fingið partarnar í Trøllanes-trætuni at tosa seg til sættis um eina loysn á lemjandi stríðnum um skúlan í kommununi.

Olga Biksopstø var ein tann fyrsta, sum royndi seg, og onnur fólk hava eisini verið uppi. Men allar royndir at fáa partarnar at tosa saman eru miseydnaðar, og støðan er fullkomiliga løst fast.

Ein av teimum, sum herfyri gjørdi eina roynd fáa tey á Trøllanesi og í Mikladali at hittast er Hans Eiler Hammer, sóknarprestur í Norðoya vestara prestagjaldi. Til økið hjá honum og Niels Paula Danielsen hoyrir Kalsoyggin.



*– Mín ætlan var als ikki at taka nakra støðu í hesum máli, men bara royna at fáa partarnar at tosa saman. Men hóast eg fór positivt til verka, so bar tað ikki til at fáa partarnar saman, sigur Hans Eiler Hammer*

### Støðan er vánalig

Prestur hitti fyri jól bæði fólk á Trøllanesi og í Mikladali.

– Eg ætlaði mær ikki at blanda meg upp í stríðið sum so, men eg vildi gera eina roynd fyri at fáa partarnar at hittast, tí støðan er ólukkulig.

– Fólk í teimum báðum bygdunum eru ikki longur saman um nakað. Stríðið um skúlan ávirkar kirkjugongd, sjómanskvinnuringin, barnatiltøk og alt annað, sum tey áður hava verið felags um. Nú vilja tey ikki longur vera saman um nakað, sigur Hans Eiler Hammer.

Royndin hjá presti miseydnaðist. Tey á Trøllanesi vóru sinnað at fara á ein fund við umboð fyri bygdaráðið og ella foreldur í Mikladali, men tá avtornaði var áhugi ikki fyri einum slíkum fundi í Mikladali.

– Mín ætlan var als ikki at taka nakra støðu í hesum máli, men bara royna at fáa partarnar at tosa saman. Men hóast eg fór positivt til verka, so bar tað ikki til at fáa partarnar saman, sigur Hans Eiler Hammer.

Hann hevur onga ítøkiliga ætlan um at gera eina nýggja roynd.



# Mentamálanevndin fylgir ikki tilráðing

**Meirilutin í Mentamálanevndini í Tórshavnar býráð mælir til, at Høgni Mikkelsen, sjálvur býráðslimur, skal byggja tann eina barnagarðin, sum býráðið hevur í hyggju at byggja, meðan Búsetur skal byggja hin. Meirilutin fylgir sostatt ikki tilráðingini hjá metingarbólkinum. Minnilutin við Jógvani Arge finst harðliga at samgonguni**

BARNAGARÐAR
*Stefan í Skorini*

– Hetta málið luktar illa. Tað tykist sum um samgongan vil geva einum av sínum egnu eitt arbeiði, hóast metingarbólkurin greitt hevur sagt, at dygdin á barnagørðunum hjá Búsetri er nógv betri, sigur Jógvan Arge, ið situr í minniluta í Mentamálanevndini.

Hann sigur á heimasíðu sínari, at hann er skelkaður av støðuni hjá meirilutanum, og at nevndin hevur tikið atlit, ið ikki seta brúkaran í fremstu røð.

Hann sigur við øðrum orðum, at samgongan nørir at sínum egnu við at lata Høgna Mikkelsen arbeiðið, hóast mælt verður til at taka at tilboðunum frá Búsetri.

Býráðið bað um tilboð um bygging av tveimum barnagørðum í Havn. Ein skal byggjast á Hamrinum á Argjum og hin skal vera á Løgmannabreyt í Hoyvík. Pláss skal vera fyri 36 barnagarðsbørnum og 24 vøggustovubørnum, so tilsamans er talan um 120 ansingarpláss.

Trý tilboð komu inn, og Høgni Mikkelsen var bíligast í báðum førum. Hansara tilboð eru á góðar 7 milliónir fyri hvønn barnagarðin uttan MVG. Tilboðini hjá Búsetri eru á umleið 8,4 milliónir fyri hvønn uttan MVG.

Tó metti metingarbólkurin, sum var mannaður við arkitekti og fólki úr umsitingini, at Mentamálanevndin skuldi taka av tilboðunum frá Búsetri. Bólkurin gjørdi eina heildarmeting, har mett varð um kostnað, tilfar, innrætting arkitektur og annað.

*Hóast ein metingarbólkur mælti Mentamálanevndini til at taka av báðum tilboðunum frá Búsetri uppá tveir barnagarðar, so tekur nevndin ikki hetta tilmælið til eftirtektar*
*Savnsmynd*



Bólkurin gav barnagørðunum karakter á einum stiga frá 1 til 10. Barnagarðurin hjá Búsetri í Hoyvík fekk 8,8 frá bólkinum, og Høgni Mikkelsen fekk 8,2. Á Hamrinum fekk Búsetur 9 og Høgni Mikkelsen fekk 8,2.

Metingarbólkurin metti sum heild, at býráðið fekk meira burturúr við at taka av tilboðunum frá Búsetri.

Tó gekk meirilutin, sum er Heðin Mortensen, Beate L. Samuelsen og Bjarti Mohr, ímóti tilmælinum frá bólkinum. Nevndin mælir býráðnum til, at Búsetur byggir barnagarðin við Løgmannabreyt fyri 8,34 milliónir krónur, meðan Høgni Mikkelsen byggir barnagarðin á Hamrinum fyri góðar 7 milliónir.

### Hugsa um peningin

Heðin Mortensen er formaður í Mentamálanev ndini, og hann leggur dent á, at peningurin hjá skattgjaldaranum skal nýtast á skilabestan hátt. Hann sigur, at um hugt verður eftir kostnaðinum, skuldi Høgni Mikkelsen fingið bæði arbeiðini.

– Tað er ógvuliga torført hjá okkum yvirfyri borgaranum at taka av dýrastu loysnini, bara tí at barnagarðarnir skulu vera júst soleiðis, sum vit ynskja tað, men tað kostar góðar tríggjar milliónir meira fyri skattaborgaran, sigur Heðin Mortensen.

Heðin sigur, at henda samgongan als ikki hevur í huga, at tað er ein samgongufelagi, ið bjóðar uppá bygginguna, og tað ikki hevur ávirkan á teirra støðutakan.

Formaðurin leggur afturat, at býráðið vil hava barnagarðarnar lidnar skjótast gjørligt. Tí er tað ein fyrimunur, at sami arbeiðsgevari ikki hevur báðar barnagarðarnar um hendi. Tá er størri trygd fyri, at barnagarðarnir verða lidnir til tíðina, heldur hann.

Heðin Mortensen avdúkar samsundis, at býráðið arbeiðir við at keypa eini hús í Kaldbak, ið skal hýsa eini 25 børnum. Við at taka av tí eina tilboðnum frá Høgna Mikkelsen sparir býráðið pening, ið verður nýttur til henda ansingarstovnin í staðin.

Fíggjarnevndin hevði fund um málið hósdagin seinnapart, og býráðið viðgjørdi málið á fundi seinni um kvøldið. Meira verður at frætta um hesar fundirnar í komandi blaði.

### 347 á bíðilista

Samlaða játtanin fyri hesar báðar barnagarðarnar er 19,2 milliónir, og tá er innbúgv roknað upp í. Hetta verður tikið av íløgukarminum, ið fyri Tórshavnar kommunu er 64 milliónir.

Arbeiðið uppá báðar barnagarðarnar byrjar 1. februar. Byggingin skal vera liðug 1. november, men býráðið fer at taka upp samráðingar viðBúsetur og Høgna Mikkelsen um at fáa barnagarðarnar lidnar tann 1. september, t.v.s. tveir mánaðir fyri tíðarætlanina.

Býráðið fer at bjóða út arbeiði at byggja tveir barnagarðar afturat, og hesi skulu vera lidnir um eitt gott ár.

Í dag standa 347 børn, ið eru eldri enn hálvt ár, á bíðilista til ansingarpláss í Tórshavnar kommunu. Tey flestu av hesum eru tilflytarar, sum ikki eru fødd í Havn, men ið eru flutt til høvuðsstaðin.

ÚTSØLA
Útsøla byrjar
fríggjadagin 11. januar
kl. 08.00
ALT 1/2 prísur
Opið er til kl. 19.00
29
Í Tróndargøtu
tel. 318200